## Andrew tapti

Andrew av Fløtum sat á beinkinum frá byrjan í venjinginardystinum hjá Fremad Amager ímóti Lyngby um vikuskiftið Støðan í hálvleikinum var 0-0, og tá skifti venjarin nakrar spælarar út. Andrew var ein av teimum, sum kom á vøllin, men tað var Lyngby, sum síðani fekk hol á. Teir skoraðu tvey mál, áðrenn Fremad Amager minkaði um munin til 2-1 nakrar minuttir fyri leiklok.

## Start tapti greitt

Norska felagið Start tapti heili 3-0 ímóti Lyn í einum venjingardysti á La Manga um vikuskiftið. Tey bæði liðini, sum vóru við í oddastrínum í Tippuliguni farna kappingarár, vóru bæði á venjingarlegu á La Manga og spældu dyst leygardagin. Lyn var greitt við yvirlutan, og Jo Tessem skoraði hattrick fyri Lyn.

– Vit høvdu ein vánaligan dag, men vit mugu royna at brúka dystin til nakað positivt, segði venjarin Tom Nordlie eftir dystin.

Todi Jónsson spældi ikki við í dystinum, tí hann er ikki heilt klárur eftir skaða.

## AB hótti HB

AB og HB spældi friggjakvøldið venjingardyst í Gundadali. HB vann dystin 5-3, eftir at liðið eisini var á odda 3-1 eitt skifti. Men AB kláraði at hótta HB nakað eina løtu, tí AB javnaði til 3-3, áðrenn HB fótaði sær aftur og gjørdi tvey mál. Millum spælararnar á liðnum hjá AB var fyrrverandi HB-liðformaðurin og núverandi venjarin hjá AB, Rúni Nolsøe.

## Nýggjur spælari skoraði

EB/Streymur hevur í løtuni ein spælara til royndarvenjingar. Talan er um afrikanska spælaran Joseph Odogu, og hann gjørdi um seg, tá ið EB/Streymur spældi venjingardyst ímóti B36 í Gundadali sunnudagin. EB/Streymur vann dystin 1-0, og Odogu skoraði einasta málið í dystinum eftir eitt korter. Hann stútaði eitt hornaspark í málið.

## Poul til Skála

Ungi miðvallarspælarin Poul Poulsen, sum seinnu árini hevur spælt á besta liðnum hjá VB, flytir nú til Skála at spæla. Harvið missir VB enn ein av sínum spælarum, eftir at spælarar sum Milan Kulic, Bjarni Johansen, Mortan í Hørg og Anders Sørensen ikki longur eru at finna á liðnum.

## Wise er vegurin fram

39 ára gamili Dennis Wise er tað stóra navnið í Coventry í løtuni. Fyrrverandi enski landsliðsspælarin er liðfelagi við føroyska landsliðsspælaran Claus Bech Jørgensen, og síðani Wise kom til felagið herfyri, hevur gingið avbera væl hjá Coventry. Leygardagin vann felagið aftur dyst í landskappingini, og hesaferð skoraði Dennis Wise bæði bæði málini í 2-0 sigrinum. Coventry hevur nú togað seg upp um miðjuna á stigatalvuni í næstbestu ensku deildini. Claus Bech Jørgensen var ikki við á liðnum hjá Coventry um vikuskiftið.

## KR tapti

Rógvi Jacobsen spældi í 78 minuttir í álopinum hjá KR, sum um vikuskiftið tapti 1-0 ímóti Vikingi í eini steypakapping. Hetta var fyrsta tapið hjá KR í ár, og heimasíðan hjá felagnum harmast um tapið. Skrivað verður, at KR átti at fingið betur úrslit, sum dysturin lagaði seg. Einasta málið í dystinum kom eftir at Rógvi Jacobsen var farin út, tí Víkingur skoraði sjey minuttir fyri leiklok.

# Álopssinnað landslið fer til USA

**Jógvan Martin Olsen hevur í dag tikið 22 spælarar út til landsliðið, sum skal á venjingarlegu í Florida seinni í hesum mánaðinum. Millum teir 20 útispælararnar eru bert tríggir spælarar, sum vanliga spæla í verjuni fyri feløg síni**

LANDSLIÐIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Hans Pauli Samuelsen er ein av nýggju spælarunum, sum er tikin út til landsliðið til árligu venjingarlegun hjá A-landsliðnum. Hetta er ein ferð, sum verður goldin Sport Five, ið umsitir rættindini til heimadystirnar hjá landsliðnum*

Eftir at nógvir spælarar vóru kallaðir inn til úttøkuvenjingar í farna mánaði, hevur nýggi landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, nú sett nøvn á teir 22 spælararnar, sum hann vil hava við A-landsliðnum til Florida at venja.

Nógvir spælarar við álopssinnaðum eginleikum eru tiknir út, og á landsliðnum hesaferð eru bert tríggir útispælarar, sum vanliga spæla verjuspælarar fyri feløgini, sum teir umboða. Teir eru Óli Johannesen, Rasmus Nolsøe og álopssinnaði bakkurin Mortan úr Hørg. Harafturat hevur Atli Danielsen roynt seg fleiri ferðir sum verjuspælari á landsliðnum, men skulu aðrir verjuspælarar finnast í hópinum, verður talan um spælarar, ið skulu royna nakað nýtt.

### Nakrir nýggir eru við

Tá ið landsliðið hevði úttøkuvenjingar í Havn í januar mánaði vóru fleiri nýggj nøvn kallað inn, og onkrir av teimum hava eisini fingið boð til Florida-ferðina.

Hanus Thorleifsson, sum í ár skal spæla við HB, Hans Pauli Samuelsen úr EB/Streymi, Christian R. Mouritsen úr Manchester City eru úttiknir, og harafturat er eisini Bergur Midjord, sum hevur snoddað eitt lítið sindur til landsliðið, tikin út.

### Tveir fáa kjansin aftur

Millum spælararnar, sum eru tiknir út hesaferð, eru tveir fyrrverandi spælarar í Fremad Amager, sum nú fáa kjansin aftur á landsliðnum. Bæði Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør hava seinastu tíðina ikki verið við á landsliðnum, men nú skulu teir royna seg aftur.

Jann Ingi og Hjalgrím spæla nú aftur fyri barndómsfeløg síni, og har gongur væl hjá báðum – so væl at landsliðsvenjarin hevur sent boð eftir teimum aftur.

### Nógvir kantspælarar

Jógvan Martin Olsen hevur í samrøðu við Sosialin áður sagt, at hann vil hava kantspælarar, sum tora og vilja bjóða av fram eftir vøllinum.

Líkt er til, at Jógvan Martin hevur tikið fleiri kandidatar til hesi pláss við sær til USA. Hann hevur í øllum førum tiki nógvar spælarum út, sum hava roynt hendan leiklutin fyri feløg síni.

Jákup á Borg, Hanus Thorleifsson, Bergur Midjord, Heðin á Lakjuni, Hans Pauli Samuelsen og Símun Samuelsen hava allir roynt hetta áður, og harafturat kunnu til dømis spælarar sum Hjalgrím Elttør, Christian Høgni Jacobsen, Jónhard Frederiksberg og Christian Restorff Mouritsen ivaleyst eisini spæla á hesum plássum.

### Nýtt ættarlið

Fyrsta landsliðið hjá Jógvan Martin Olsen er merkt av nógvum ungum og álopssinnaðum spælarum, og ættarliðsskiftið, sum tað hevur verið tosað um seinnu árini, tykist vera veruleiki.

Av teimum veruliga garvaðu og eldru landsliðsspælarunum eru bert Óli Johannesen og Jákup Mikkelsen eftir.

Harafturat eru spælarar, sum eru etableraðir á landsliðnum, hóast teir ikki hava sama aldur ella somu royndir sum teir báðir. Millum hesar kunnu nevnast Andrew av Fløtum, Rógvi Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Christian Høgni Jacobsen, Jákup á Borg, Heðin á Lakjuni, Atli Danielsen og Jónhard Frederiksberg.

Jens Martin Knudsen, sum hevur verið fastur maður á landsliðnum øll árini við EM- og HM-fótbólti er blivin málmansvenjari, og hann er ikki við sum spælari.

### Nakrir halda frí

Spælarar sum Súni Olsen, Ingi Højsted og Jón Rói Jacobsen eru ikki tiknir út til USA-ferðina. Spælararnir úr superliguni hava fingið frí, og tað sama er við Inga Højsted. Harafturat hevur Jón Rói Jacobsen fingið ein nýggjan snudd í knæið og er skaddur í løtuni.

Av teimum 22, sum eru tiknir úr hesaferð, eru tí bert fimm, sum spæla fyri feløg í útlandinum.

## FAKTA

Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, hevur tikið hesar 22 spælarar út til venjingarleguna hjá landsliðnum í Florida

| | |
|---|---|
| **Málmenn** | |
| Jákup Mikkelsen | B36 |
| Gunnar Nielsen | Frem |
| **Útispælarar** | |
| Fróði Benjaminssen | B36 |
| Hanus Thorleifsson | B36 |
| Bergur Midjord | B36 |
| Jann Ingi Petersen | B68 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/Streymur |
| Jákup á Borg | HB |
| Kári Nielsen | HB |
| Rasmus Nolsøe | HB |
| Mortan úr Hørg | HB |
| Atli Danielsen | KÍ |
| Heðin á Lakjuni | KÍ |
| Hjalgrím Elttør | KÍ |
| Christian H. Jacobsen | NSÍ |
| Pauli G. Hansen | Skála |
| Jónhard Frederiksberg | Skála |
| Óli Johannesen | TB |
| Christian R. Mouritsen | Manchester City |
| Rógvi Jacobsen | KR |
| Andrew av Fløtum | Fremad Amager |
| Símun Samuelsen | Keflavík |